e-mail: jakup@sosialurin.fo

# Ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

**Frásagnir frá hálvfinalunum í steypakappingini verða í blaðnum í morgin**

# Døma í Spania

*Eins og fótbóltsleikararnir, eru dómarar okkara eisini noyddir at fyrireika seg til landskappingina, og verður hetta gjørt á ymsar hættir*

JÁKUP MØRK

Nú farið er um ársskiftið, eru flestu fótbóltsleikarar helst farnir at hugsa um heimligu kappingina, og í næstum fara venjingarnar kring landið at byrja.

Ein partur av leikinum á grøna gras(líkinum) er sjálvandi eisini luturin hjá dómarum okkara, og hesir eru sjálvandi eisini farnir undir sínar fyrireikingar.

**Fara uttanlands**

Komandi vikuskifti fer Birgir Sondun, sum í fleiri ár hevur dømt fyrstudeildarfótbólt, til Svøríkis, har han skal luttaka á skeiðið, sum er fyriskipað av svenska fótbóltssambandinum.

Talan er um skeið, sum svenska fótbóltssambandið skipar fyri á hvørjum árið, og stendur tað FSF í boði at luttaka á hesum skeiði.

Talan verður helst eisini um dómaraskeið, har føroyingar kunnu luttaka, í bæði Noreg og Danmark, men enn er ikki endaliga avgjørt, hvussu verður við hesum.

Tá føroyska A-landsliðið um mánaðarskifti komandi skal á venjingarlegu í Spaniu, standa standa tveir dystir í nýskipaðu NM-kappingini eisini á skránni.

Føroyingar skulu tá leika móti Finlandi og Íslandi, og umframt at landsliðsleikararnir eru við á ferðini, er eisini Lassin Isaksen við í ferðalagnum.

Lassin skal á ferðini døma dystin millum Finnland og Ísland, og afturat sær á ferðini skal hann hava ein føroyskan hjálpardómara. Enn er tó ikki avgjørt, hvør hesin verður.

**Væl fyrireikaðir**

FSF roynir at leggja stóran dent, at fótbóltsdómarar okkara eru fakliga væl fyri, og í hesum sambandi verða eisini skeið av ymsum slag hildin.

Í løtuni verða fyrireikingarskeið til komandi dómarar hildin, og skulu hesir tli próvtøku seinast í hesum mánaðinum.

Harumframt verður eisini hildið skeið fyri verandi dómarum, og verður tað í ár norðmaðurin, Reidar Bjørnestad, sum skal standa fyri skeiðnum. Hesin er annars í starvi hjá norska fótbóltssambandinum, og er tað eisini í samstarvi við teir, at vitjanin er fingin í lag.

**Dómarar venja**

At enda skulu vit siga frá, at vit hava eina áheitan til allar áhugaðar dómarar frá Birgiri Sondun og Oddmari Andreasen. Teir boða frá, at komandi vikurnar verða teir á vøllinum í Gundadali hvønn mána-, miku- og fríggjadag, har teir ætla at vemja eitt sindur. Ætlanin er, at venjingin skal fevna um bæði renning og bóltspæl, umframt at teir fríggjadag eisini ætla sær at ein túr niðan í svimjihylin. Sum sagt heita teir á allar áhugaðar dómarar at møta upp, soleiðis at venjingin kann gerast so hugalig sum gjørligt.



*Lassin Isaksen skal seinast í hesum mánaðinum á ferð til Spania, har hann skal døma dystin Finnland-Ísland*
***Savnsmynd***

# Badminton

*Enn eitt umfar í Grand-Prix kappingini var leikt í vikuskiftinum*

JÁKUP MØRK

Seinasta vikuskifti varð enn eitt umfar í Grand-Prix kappingini í badminton leikt.

Kappingin fór fram í badmintonhøllini í Havn, og var kappast í ymsum aldursbólkum.

Hóast stóru aldursmunur var á luttakarunum, so hugnaðu tey sær óført, líkamikið um tað vóru smæstu genturnar, sum leiktu einmanleik sína millum, ella um talan var um harðar dystir millum menninar í tvímansleikinum.

**Tey yngru**

Leygardagin stóðu yngru leikararnir so fyri tørni.

Fyri at alt skuldi kunna avgreiðast í góðari tíð, varð byrjað hampuliga tíðliga, men hetta sá ikki út til at nerva leikararnar serliga nógv, og hugagóð fóru tey undir dystirnar.

Leikt varð fram til náttúrðatíð, og tá avtornaði, gjørdust úrslitini hesi:

**Gentur upp til 10 ár:**
Nr. 1 Brynhild Carlson, HBF
Nr. 2 Agnas Olsen, VÍF

**Gentur 10-12 ár:**
Nr. 1 Christina Eriksen, VÍF
Nr. 2 Rannvá á Rógvu, VÍF

**Dreingir upp til 10 ár:**
Nr. 1 John André Niclasen, ÍF
Nr.2 Jan Ellingsgaard, ÍF

**Dreingir 10-12 ár:**
Nr. 1 Niclas Eysturoy, HBF
Nr. 2 Hilmar Kass Jacobsen, HBF

**Dreingir 12-14 ár:**
Nr. 1 Gunnar Poulsen, HBF
Nr. 2 Thomas Rubbeksen, HBF

**Dreingir 14-16 ár:**
Nr. 1 Meinhard Arge Jensen, HBF
Nr. 2 Høgni Madsen, ÍF

**Tey vaksnu**

Sunnudagin skuldu tey vaksnu so leika, og sum vera man, so varð nógv lagt fyri.

Eftir fleiri góðar og spennandi dystir, vórðu vinnararnir í ymsu bólkunum at enda funnir, og vóru endaligu úrslitini hesi:

**Blandaður tvímansleikur:**
Nr.1 Elin Jacobsen, HBF og Erland Poulsen, HBF
Nr.2 Kristianna Thorkildshøj, HBF og Heðin Joensen, HBF

**Tvímansleikur, kvinnu:**
Nr.1 Ingun Hansen, Strálan og Kristianna Thorkildshøj, HBF
Nr.2 Guri Poulsen, HBF og Elsa Thorkildshøj, HBF

**Tvímansleikur, menn:**
Nr.1 Gunnar M. Gregoriussen, HBF og Heðin Joensen, HBF
Nr.2 Regin Hammer, HBF og Erland Poulsen, HBF



# Nú kemur jokarin

*Enn ein møguleiki hjá teimum, sum droyma um at gerast millióningar í eini handavending*



JÁKUP MØRK

Frá mánadegnum at rokna, fáa tey veddingarhugaðu enn ein møguleika at gerast millióninar, við tað at Dans Tipstjeneste tá víðkar útboðið av spælimøguleikum við enn einum spæli.

**7.000.000 kr.**

Nýggja spælið ber heitið, Joker, og í stuttum er tað soleiðis háttað, at tú fyri ein eyka kostnaða á 10 kr. fært eitt sjey siffrað tal prentað ovast á seðilin, um tú luttekur í lotto, dusino ella tipping.

Ert tú heppin, og hevur rætta talið á tínum seðli, kan hetta geva ein risavinning, sum kan verða heilt upp í sjey mió.kr. Tær nýtist tó ikki at hava øll tølini røtt, tí vinningar verða latnir, heilt niður til tvey røtt tøl.

Í øðrum londum hava tey góðar royndir av hesum spæli, og hava tað eisini verið fleiri stórir vinningar. Dansk Tipstjeneste roknar við, at hetta eisini fer at verða væl umtókt í Danmark, Grønland og Føroyar íroknað, og vænta tey, at árligu inntøkurnar av hesum fara at verða um hálvu milliardina.



# Petur, Vilmund og Paula fremst

*Nú annað umfarið í Grand-Prix kappingini í borðtennis fer í gongd um vikuskifti, verður hugt at støðunum í teimum ymsu deildunum*



*Eftir fyrsta umfar er Birgir Carlson úr Tór á triðja plássi í meistaradeildini*
***Savnsmynd***

Sum kunnugt verður ársins næsta Grand-prix kapping í borðtennis leikt Badmintonhøllini í Havn komandi leygardag.

Hetta er annars fyrstu ferð, at NTSF, Borðtennissamband Føroya, skipar fyri eini veruligari Grand-Prix kappin gjøgnum ein heilan vetur. Sum so er ein slík kapping ikki øðrvísi skipað enn ein vanlig opin kapping, men munurin hesu ferð er, at hetta er ein miðvís kapping, sum fevnir um trý vikuskifti, og har leikarar fáa eitt ávíst stigatal fyri vunnar dystir.

**Petur fremst í meistaradeildini**

Hyggja vit at úrslitunum í fýra teimum bestu deildunum, síggja vit, at í meistaradeildini liggur Petur Niclasen, Tór, fremst við fullum stigatali, nevnliga 500. Næstur honum koma Eyðun Luid, Tór, við 470 stigum, Fríði Jensen, TBF, við 450 stigum og Birgir Carlson, Tór, eisini 450 stig.

Higartil í ár hevur Petur havt eitt gott kappingarár, og hann vann eisini opnu kappingina, sum var fyrsta tiltakið hjá BTSF í vetur.

Enn er tó einki avgjørt í meistaradeildini, tí roknast kann við, at flestu dystirnir verða javnir og neyvan avgjørdir fyrr enn í evstu løtu.

**Vilmund fremst í meðaldeildini**

Í meðaldeildini liggur Vilmund Jacobsen, B68, fremst við 500 stigum, sum fult stigatal. Næstur honum liggja Niels S. Johannesen, Tór, við 470 stigum, Paula Eikhólm, Streymur, við 450 stigum og Vagnur Nolsøe, TBF, sum hevur 430 stig.

Kappingin í meðaldeildini er kanska ikki eins spennandi, og tann í meistaradeildini, men enn kann alt henda, tá ið tað framvegis resta tvær av teimum trimum kappingunum.

**Paula, Heidi og Eyðun**

Í kvinnudeildini hevur Paula Eikhólm 500 stig, systurin, Súsanna Eikhólm hevur 470 stig, meðan Elinborg Nygaard, TBF og Sunrid M. Hansen, OyÍF, hava ávíkavist 450 og 435 stig.

Í gentudeildini er støðan tann, at Heidi M. Hansen hevur 500 stig, Maibritt Magnussen hevur 470 stig, Eleonora Kerá hevur 450 stig og Birita Rasmussen hevur 435 stig. Allar fýra koma tær úr OyÍF.

Í unglingadieldini er støðan tann, at Eyðun Jacobsen úr B68 og Martin Olsen úr Tór eru á odda. Eyðun hevur 500 stig, meðan Martin hevur 475 stig.

# Uppsagdur

*Fyrradagin varð fyrrverandi danski landsliðsleikarin, sum umframt at spæla við AGF eisini hevur verið yrkisleikari hjá Liverpool, sagdur úr starvi sum ítróttarráðgevi hjá kreppurakta danska felagnum*

Jákup Mørk

Seinastu tíðina hava umfatandi umskipanir verið framdar í felagnum hjá Óla Johannesen, AGF.

**Stjórin tekur yvir**

Nú er so enn ein bygnaðarbroyting farin fram, við tað at AGF fyrradagin boðaði frá, at fyrrverandi yrkisleikari felagsins, Torben Piechnik, ikki longur er í starvi hjá felagnum.

Hetta boðar AGF frá í einum stuttorðaðum tíðindaskrivi. Starvsøkið hjá Piechnik var leikarasáttmálar og handil við leikarum, og verður tað framyvir nýggi stjóri felagsins, Dan Iversen, sum kemur at hava ábyrgdina av hesum.

Sostatt gjørdist starvstíðin hjá fyrrverandi EM-vinnaranum rættuliga stutt, tí hann byrjaði í nýggja starvinum seinasta heyst, eftir at hann mátti gevast við fótbóltinum orsakað av skaðum.

Ein av teimum sáttmálum, sum Piechnik fekk í lag, meðan hann var í felagnum, var tá Óli Johannesen í heyst fór frá TB til danska superligafelagið.



*Í løtuni fara fram stórar broytingar í fyrrverandi stórfelagnum, AGF, har Óli Johannesen og liðfelagarnir royna at halda seg omanfyri niurflytingarstrikuna*
***Savnsmynd***

# Ótespiligt

*Ítróttarfólk úr fyrrverandi Eysturtýsklandi merkja nú syrgiligu avleiðingarnar av, at tey í fleiri ár nýttu ólóglig stimbrandi evni til at bøta um ítróttarligu avrikini*

JÁKUP MØRK

Nú er eftir hondini langt síðani, at tað varð alment kent, at nógv ítróttarfólk í gomlu kommunist londunum, nýttu ólóglig evni.

Fram til seinast í áttatiárunum, stóðu fleiri av hesum ítróttarfólkum heilt ovarlaga, tá heiðursmerki vórðu býtt út. Við tað at kommunistusku londini ofta nýttu hesi avrik sum politiska propaganda, gjørdu ítróttarleiðarar alt teir kundu, fyri at tryggja íðkarunum so góðar fortreytir sum gjørligt, og ein partur av hesum var at nýta ólóglig stimbrandi evni.

Øll hava helst hoyrt um ræðusøgurnar, har børn við góðum ítróttarevnum fingu tablettir av ymsum slag aftur við matinum, í teirri trúgv, at talan var um vitaminir og anna gott.

Í veruleikanum var talan sjálvsagt um ólóglig stimbrandi evni, og fór tískil ein skipað doping fram.

Seinastu árini hava vit eisini hoyrt fleiri av fyrrverandi ítróttarfólkunum greitt frá, hvussu stór nýtslan av dopingevnum var, og eisini hevur eitt nú venjarin hjá SC Motor Jena, Horst-Dieter Hile, greitt frá, hvussu hesin háttur varð nýttur at betra um avrikini hjá rennarunum, sum hann vandi.



*Ítróttarfólkini í fyrrverandi eystanlondunum vóru í fleiri ár út fyri skipaðari dopingmisnýtslu*
***Savnsmynd***

**Vanskeplað børn**

So við og við, vóru fleiri av hesum ólógligu ítróttarfólkum avdúkað.

Árinini, sum hava staðist av hesi áralongu misnýtslu, fáa ítróttarsambondini tó einki gjørt við, og nógv ítróttarfólk hava seinnu árini merkt, at kroppur teirra hevur tikið skaða av hesum.

Seinast er tað komið fram, at fleiri fyrrverandi ítróttarkvinnur hava átt vanskeplað børn, við tað at skipaða dopingin hevur avskeplað kyknubygning teirra.

**Rættarmál**

Í gjár byrjaði so eitt rættarmál móti yvirlæknanum, Lothar Kipke, sum í fleiri ár hevði ábyrgdina av eysturtýska svimjilandsliðnum.

Ein fyrrverndi eysturtýskur elitusvimjira hevur nú átt ein son, sum hevur vanskeplaðan fót, meðan ein onnur hevur átt eina blinda dóttir.

Væntast kann, at hetta rættarmál kann hava rættuliga stóran týdning, tá hugsað verður um, hvussu slíkar gølur verða viðgjørdar í framtíðini.